## Kurt í oddadysti í kvøld

Elnesvågen/O, sum hevur føroyska Kurt Mørkøre sum venjara, strembar eftir uppflyting í triðbestu norsku deildina. Eitt rættiliga týðandi og avgerandi fet kann takast í kvøld, tá felagið spælur oddadyst á heimavølli móti eykaliðnum hjá Molde. Liðið hjá Kurt Mørkøre hevur vunnið allar heimadystirnar í hesum kappingarárinum. Elnesvågen/O liggur í løtuni á fjórða plássi við 21 stigum. Eykaliðið hjá Molde er fremst við 30 stigum.

## Bólturin aftur á rull

Í kvøld verður fari undir aftur fótbóltskappingini hjá teimum næstbestu. Fýra dystir eru á skránni, har grannauppgerðin millum TB og VB/Sumba var avgreidd undan summarsteðginum. Oddaliðið 07 Vestur vitjar í Leirvík, har eykaliðið hjá Víkingi bíðar. AB er í hølunum á oddaliðunum í løtuni, og ein sigur er krav, tá argjamenn vitja í Runavík, har eykaliðið NSÍ tekur ímóti. Í Havn hittast tey næstbestu hjá HB og B68, meðan botndystur verður í Klaksvík, har næstbestu liðini hjá KÍ og EB/Streymi bresta saman.

EB/Streymur - NSÍ

# Veruligur toppdystur



**Tað sigur Óli Hansen, liðformaður hjá NSÍ, um dystin móti EB/Streymi, sum vóru teirra argastu kappingarneytar um meistaraheitið í fjør. Sigfríður Clementsen, venjari hjá EB/Streymi, hevur góðar vónir**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað vóru EB/Streymur og NSÍ, sum kappaðust um meistaraheitið í fjør. Tað tykist tað eisini at vera í ár. Runavíkingar eru fimm stig aftanfyri EB/Streym, sum eisini í fjør hevði vunnið sær gott forspring, men har NSÍ megnaði at hála inn á og síðani yvirhála.

Tað ætlar NSÍ at gera aftur í ár. Til at fyribyrgja hesum hevur Sigfríður Clementsen so at siga allar mans tøkar. Høgni Zachariassen fær væntandi gipsi av beini sínum í vikuni, og verður, um alt gongst væl, tøkur um eini fimm vikur. Hann verður tískil ikki við í annaðkvøld.

Tað verður Mikkjal Thomassen harafturímóti. Vælvaksni miðvallarleikarin hevur verið skaddur, men kom á vøllin á Oakwell Ground hósdagin. Og tá man kann spæla móti Manchester City, so kann man eisini spæla ímóti NSÍ. Hetta kemur væl við, tí íroknað teir báðar altjóða dystirnar, hevur EB/Streymur tapt fimm ferðir á rað.

– Hetta eru vit sjálvandi ikki glaðir um. Men ímóti B36 vóru vit minst líka góðir sum teir, og dystirnir móti Manchester City vístu, at vit eru á rættari kós, sigur Sigfríður Clementsen, venjari hjá EB/Streymi.

### Jónas ivasamur

Í NSÍ vilja tey á ongan hátt kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur. – Hetta verður ein ótrúliga spennandi dystur, ein veruligur toppdystur, staðfestir Óli Hansen, liðformaður hjá NSÍ. Hann hevur stóra virðing fyri EB/Streymi og metir ikki, at tað er ein fyrimunur hjá NSÍ, at teir drógu longra stráðið í FM-stríðnum í fjør.

– EB/Streymur hava verið drúgvir í ár, og hava fingið stig í dystum har spælið ikki altíð hevur verið tað besta, vísir Óli Hansen á. Tí er tað hugaligt at hann sum liðformaður kann staðfesta, at allir mans eru tøkir.

Jónas Þór Næs breyt eitt bein í fótinum herfyri, men hevur havt hampiliga tíð at koma fyri seg í nú. Og tað vóna teir í Runavík sjálvsagt eisini, at hann er.

**Formuladeildin:**
EB/Str – NSÍ: Páll Augustinisen
HB – Víkingur: Dagfinn Olsen
Skála – ÍF: Rúni Gaardbo
KÍ – B68: Ransin Djurhuus
B71 – B36: Lars Múller

**1. deild:**
Víkingur – 07 Vestur: Bárður Mortensen
NSÍ – AB: Høgni Hansen
HB – B68: Georg Rasmusen
KÍ – EB/Str: Alex Troleis

# Skála skal úr botninum

**John Petersen, venjari, staðfestir, at Skála skal vinna fleiri av dystunum, sum resta. Og hann sær fegin, at byrja verður í annaðkvøld**

UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



Á Skála kunnu tey staðfesta, at skjótt broytist í fótbólti. Fyri tveimum árum síðan var felagið við í heiðursmerkjastríðnum í Formuladeildini. Nú skal stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting.

Stig skulu fáast til høldar skjótast gjørligt, og skálamenn síggja fegin, at trý stig koma á kontoina, tá fuglfirðingar vitja í morgin.

- Fyri at sleppa undan niðurflyting skulu vit vinna fleiri av dystunum, sum resta. Og vit kunnu líka so væl byrja í morgin, sigur John Petersen, venjari, í stuttari viðmerking.

Verjuleikarin Vali Miela er leikbannaður, og verður tískil ikki við í morgin. Teitur R. Joensen og Jógvan Joensen eru ikki tøkir, vegna skaða.

ÍF hevur vunnið sær fasta legu í miðjuni av stigatalvuni. Fuglfirðingar skulu sjálvsagt vinna sær fleiri stig fyri at varðveita sætið, men David Jones og hansara leikarar hava ráð at missa stig. Tað fer ikki at broyta, at ÍF fer at leggja nógv fyri at fáa øll stigini á Skála í annaðkvøld.

Framherjin Sasa Jovanovic er skaddur, meðan miðvallarin Høgni Madsen ikki verður við vegna leikbann.